Føroya Náttúrugripasavn | V. U. Hammershaimbsgøta 13 | FO-100 Tórshavn | Tel. +298 35 23 00 | Fax +298 35 23 01 | ngs@ngs.fo | www.ngs.fo






# SOSIALRÁÐGEVI
## til Økisdeildina í Tórshavn

Almannastovan søkir eftir sosialráðgeva til Økisdeildina í Havn.

Uppgávurnar hjá Almannastovuni eru, við grundarlagi í sosiallóggávuni, at veita persónliga sosiala ráðgeving og vegleiðing, og alment og persónligt at upplýsa um rættindi og skyldur.

Arbeiðs- og ábyrgdarøkið hjá Almannastovuni er at ráðgeva og vegleiða borgarum um rættindi og skyldur viðvíkjandi almannaspurningum. At seta í verk fyriskipanir sambært almannalóggávuni og avgreiða fíggjarligar veitingar. Eisini skal Almannastovan fáa til vega og greina hagtøl til politiska myndugleikan.

**FØRLEIKAKRØV**
Ert tú sosialráðgevi, ella hevur tú aðra hóskandi sosiala ella samfelagsliga útbúgving, og hevur tú hug til sosialt arbeiði og ynskir at gera mun, so er tað tær vit vilja hava fatur á.

**STARVIÐ**
Sum starvsfólk á Almannastovuni hevur tú ein týðandi leiklut, tá tað snýr seg um at skapa fíggjarliga og sosiala trygd. Somuleiðis liggur ein ábyrgd hjá tær saman við øðrum starvsfeløgum at fyribyrgja sosialum trupulleikar, áðrenn hesir stinga seg upp.

Vit kunnu bjóða tær eitt starv í einum spennandi umhvørvi í støðugari menning við nógvum og fjølbroyttum avbjóðingum, har møguleiki er fyri persónligari og fakligari menning.

**LØNAR- OG SETANARVIÐURSKIFTI**
Størvini verða sett og lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið í lønarbólki 6, ella avvarðandi yrkisfelag, um tað fevnir um sáttmálaøkið hjá Almannastovuni.

**NÆRRI UPPLÝSINGAR**
Nærri upplýsingar um starvið fæst við at venda sær til Rúna Rasmussen, deildarleiðara á Økisdeildini í Tórshavn á telefon 35 35 70.

Umsókn við avriti av prógvum, CV, v.m. skulu sendast til Almannastovuna, Smyrilsveg 20, Postboks 3096, 110 Tórshavn. ella við telduposti til almannastovan@almannastovan.fo

**FREISTIN**
Umsóknarfreist er hósdagin 13. nov. 2008 kl. 12.00.
Vinarliga merkið brævbjálvan: "Sosialráðgevi til Økisdeild í Havn".

almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo

almannastovan